# Skóru dekk upp

**Tveir bilar á Hálsi máttu finna sær nýggj dekk fyri at sleppa heim eftir steypafinalurnar leygardagin**

LØGREGLUTÌÐINDI
*Heri á Rógvi*

Tað var ikki alt, sum gekk so friðarliga fyriseg í sambandi við steypafinalrunar í flogbólti, sum vóru leiktar í høllini á Hálsi leygardagin.

Nakrir ókendir gerningsmenn hava latið frustratiónirnar hjá sær ganga útyvir nakrar bilar, sum stóðu parkeraðir uttanfyri høllina.

Av Politistøðini í Havn frætta vit, at tveir bilar fingu skorið dekkini upp, og ein bilur fekk nakrar skøvur í lakki.

Annars lata tey á Politistøðini væl at vikuskiftinum, sum hevur verið stak friðarligt. Nakrir hava sovið rúsin av sær á støðini, men annars hevur ikki verið tað nógva at skriva heim um hjá løgregluni í høvuðsstaðnum.

# Doyði einsamallur í báti

**Ein maður, sum var farin at royna eftir hemara í báti sínum, varð funnin deyður norður úr Mýlingi**

LØGREGLUTÌÐINDI
*Heriá Rógvi*

59 ára gamli Jóan Jakku Blástein fór í góðveðrinum fríggjadagin við bátinum Hvannadalur at royna eftir hemara í Vestmannasundi. Meðan hann var úti royndu fólk at ringja til hansara, men hann svaraði ikki. Tá tað leið móti kvøldi, og tað framvegis einki hoyrdist frá Jóan Jakku gjørdust fólk bangin um hann og boðað varð frá til løgregluna.

Sjóbjargingarstøðin MRCC-Tórshavn fekk fríggjakvøldið kl. 20.11 boðini. Báturin, sum var ein sekæringur, varð seinast sæddur kl. 16.30 stutt norðanfyri Vestmanna.

MRCC upplýsir í tíðindaskrivi, at bátar úr Vestmanna fóru at leita. Brimil og Tjaldrið fóru somuleiðis á leiðina. Ùr Vágum fór tyrla við serligari leitiútgerð.

Kl. 22.09 fríggjakvøldið kom tyrlan fram á bátin, sum tá var staddur 3,5 fjórðingar úr Mýlingi. Brimil kom á staðið stutt eftir og kundi staðfesta, at maðurin, Jóan Jakku Blástein, var umborð, men sýntist lívleysur. Seinni varð staðfest, at maðurin var deyður.

Jóan Jakku Blástein var giftur og átti fýra børn.

# Helvin Høst nýggjur formaður fyri Norðurlandahúsið

**Stýrið fyri Norðurlandahúsið hevur havt fund hósdagin og fríggjadagin. Karin Kjølbro fór frá sum formaður, og nýggjur formaður er danin Helvin Høst, sum er hálvur hvalbingur**

NORÐURLANDA-HÚSIÐ
*Tíðindaskriv*

Á fundinum var regluliga formansvalið, sum er annaðhvørt ár. Fráfarandi formaðurin Karin Kjølbro, sum er fyrsti føroyski formaðurin í stýrinum, takkaði fyri seg. Nývaldur formaður er Helvin Høst úr Danmark. Hann er útbúgvin løgfrøðingur og hevur starvast í danska mentamálaráðnum síðani 1975.

Hóast Helvin er fyrsti danski stýrisformaðurin í Norðurlandahúsinum, er hann ikki ókendur í Føroyum. Hann hevur vitjað her ofta og pápin, Olaf Jensen, var úr Hvalba. Týsdagin verður Helvin 60 ár.



*Helvin Høst er nýggjur formaður í stýrinum fyri Norðurlandahúsið í Føroyum*

# Rætting

Í blaðnum hósdagin stóð grein um, hvussu umleggingin av Bussleiðini í høvuðsstaðnum ávirkar skúladagin hjá børnunum í Kollafirði, sum dagliga koyra til Havnar í skúla. Har bleiv sagt, at tey fóru heimanífrá áðrenn klokkan sjey á morgni og vóru ikki heima aftur fyrr enn um hálvgum sekstíðina á kvøldi.

Hetta er tó ikki rætt. Tey eru heima aftur um fýratíðina. Undirritaða átekur sær fulla ábyrgd fyri mistakið.

**Solby**

# Áheitan á ST-Trygdarráðið viðvíkjandi Irak

TÌÐINDASKRIV
*Amnesty International*

Amnesty International heitir á fólk um at venda sær til ST-trygdarráðið við eini áheitan um at meta um avleiðingarnar fyri mannarættindini hjá fólkinum í Irak, áðrenn støða verður tikin til eitt hernaðarligt álop á Irak. Til ber at skriva undir elektroniskt á heimasíðuni ella at prenta ein lista út, sum fleiri kunnu skriva undir og senda við posti.

Amnesty óttast fyri, at støðan hjá fólkinum í Irak, sum longu er sera ring og hevur verið tað í fleiri ár, fer at versna álvarsliga, um eitt álop verður framt á landið. Á heimasíðuni ber til at lesa meira um støðuna hjá fólkinum í Irak nú og metingarnar hjá Amnesty International um hóttandi kríggið í Irak

## VIÐMERKINGAR

# Skeivur búskaparpolitikkur mótvegis kommununum

**Latið okkum sleppa takinum á íløgukarminum hjá kommununum, soleiðis at peningur heldur verður brúktur til neyðugar íløgur enn óneyðugan hækkandi rakstur.**



**Jógvan við Keldu, løgtingsmaður og býráðslimur:**

Eftir kreppuna fyrst í nítiárunum vóru víðfevndar broytingar gjørdar í samstarvinum millum landskassan og kommunurnar. Eitt nú vórðu allar náttúrligar íløgugjaldingar úr landskassanum til kommunurnar steðgaðar. – Eisini vóru ymiskar umleggingar framdar millum rakstur og íløgur, við m.a. at geva kommununum ein fastan íløgukarm, lagaðan eftir fólkatali og inntøkum.

Inntøkurnar hjá kommununum so væl sum hjá landskassanum eru nærum tvífaldaðar, og samfelagið ídag er eitt heilt nýtt, vit kunnu næstan siga, eitt endurstovnað samfelag.

### Einasti partur við ongari eftirgeving av lánum

Hóast kommunurnar vóru einasti táttur í samfelagnum, sum samfelt ikki fingu nakra eftirgeving og niðurskriving av lánunum, eru allarflestu teirra í dag rættuliga væl fyri, soleiðis, at lánsbyrðan liggur fyri tær flestu ikki hægri enn eina skattaálíkning.

Ferð eftir ferð havi eg frá tingsins røðarapalli og í skriving gjørt vart við, at landsstýrið hevur lagt á skeivan bógv, tá trýstið á kommunurnar er, at íløgurnar ikki skulu fara upp um ávísan íløgukarm, meðan onki verður nevnt um raksturin.

Hetta hevur ídag elvt til, at fleiri av kommununum í menning, ikki sleppa at gera neyðugar íløgur, meðan peningur alt meiri verður nýttur til rakstur.

### Heldur rakstur enn íløgur

Givið er, tað hevur søgan og "Parkinsons lóg" eisini lært okkum, at verður peningurin ikki nýttur til skilagóðar íløgur, eitt nú til at loysa íbúðatrupulleikar, ídnaðar- og havnarøki, nýhugsan innan sosialar íbúðir o.a., verður hann brúktur til hækkaðar - og kanska ofta óneyðugar – rakstrarútreiðslur.

Kommunurnar hava nú eftir lógarbroytingarnar í kommunulógini fingið so mikið fríar ræsur, at einki er í vegin fyri, at tær kunnu gera tær íløgur, sum peningur er til, tí er skeivt, at ein fastur íløgukarmur verður settur av landsins leiðslu. – Her áttu kommunurnar sjálvar at fingið ræðisrættin yvir skattapeninginum.

Vit skulu eisini minnast til, at skal lánsbyrðan hjá eini kommunu upp um eina álíkning, skal loyvið útvegast frá landsstýrinum, um íløgurnar skulu fíggjast við lántøku.

### Sleppið íløgukarminum

Eg fari tí at heita á ta landsstýrissamgongu, sum eg sjálvur eri limir av, at sleppa takinum á íløgumenningini, soleiðis at føroysku kommunurnar heldur nýta pening til íløgur, enn at hækka raksturin óneyðugt.

Vit skulu gera okkum greitt, at vælskipaðar íløgur geva borgarum í flestu førum og á øllum økjum menningarlig livilíkindi, meðan óneyðugur hækkandi rakstur oftast bert tyngir um bæði umsiting og tá skilagóðar avgerðir verða tiknar. – Kommunurnar treingja ávísar íløguábøtur.

Vónandi verða broytingar nú framdar í hesi búskaparligu skeivu gongd yvirfyri kommunum.




# Citroën Xsara



Um eingin bilur er í býti
fáa tygum ***ókeypis:***
4 sportfelgur
4 lamell-/píkadekk
1 komplett Dinitrol
rustviðgerð
***- ella ein góðan avsláttur***

**Prestige 1,6I 16V 110HK**
***Prestige útgerð***
6 airbags, aircondition, el-spegl v/hita,
veloursetur, hita í setrum framman,
fløguspælari v/6 hátalarum, tónaðar
rútar, fjarðstýrt sentrallás, tokulyktir framman

**171.000,-**

**Elegance 2,0HDI 110HK**
***Elegance útgerð, umframt Prestige***
Regnsensorar í forrútinum,
síðuspegl, ið kunnu leggjast inn at síðuni,
board teldu, leður róður

**195.000,-**

**Avmarkað nøgd**

*Vælkomin til*

CITROËN
***Ivan Johansen Bilar***
***www.ivan.fo***





# Lærlingur søkist

**Søkt verður eftir bakaralærlingi til at byrja sum skjótast.**

**Umsóknir skulu sendast til Miðberg Bakarí, Heiðavegur, 600 Saltangará. Umsóknarfreist 15. mars 2003.**

**Ynskir tú at fáa nærri at vita um starvið, kanst tú venda tær til Sofus Hansen, tlf. 447366.**

MIÐBERG



## Teksthøvundi

Til okkara nýggju reklamustovu, sum Smyril Line kemur at seta á stovn í næstum, verður søkt eftir royndum teksthøvunda

**Starvið fevnir um gerð av:**
- teksti til felagsins lýsingar
- teksti til felagsins ferðaætlanir
- teksti til felagsins faldarar
- teksti til felagsins plakatir
- teksti til felagsins tíðarrit
- tekst til øll okkara lay-out annars
- hjálpa til við tí grafiska arbeiðinum í samband við omanfyrinevnda

**Førleikakrøv:**
- útbúgving sum teksthøvundi ella líknandi
- kann arbeiða sjálvstøðugt
- góð samstarvsevnir
- góðan málkunnleika

**Vit bjóða starv:**
- í altjóða umhvørvi
- í felag við støðugari framgongd
- har viðkomandi er við at byggja upp reklamustovuna

Løn sambart avtalu.

Starvið verður at seta skjótast gjørligt.

Meira um starvið fæst at vita við at venda sær til Áka Jespersen, deildarleiðara á tlf. 34 59 00.

Umsóknir - sum allar verða viðgjørdar í trúnaði - verða at senda til:

**Smyril Line**
**Postsmoga 370**
**110 Tórshavn**

SMYRIL LINE



## Grafikari

Til okkara nýggju reklamustovu, sum Smyril Line kemur at seta á stovn í næstum, verður søkt eftir royndum grafikara

**Starvið fevnir um:**
- gerð av felagsins lýsingum
- gerð av felagsins ferðaætlanum
- gerð av felagsins faldaranum
- gerð av felagsins plakatum
- gerð av felagsins tíðarritum
- lay-out annars
- at alt tað omanfyrinevnda er klárt til prenting

**Førleikakrøv:**
- útbúgvning sum grafikari ella líknandi
- kann arbeiða sjálvstøðugt
- góð samstarvsevnir
- góðan málkunnleika

**Vit bjóða starv:**
- í altjóða umhvørvi
- í felag við støðugari framgongd
- har viðkomandi er við at byggja upp reklamustovuna

Løn sambart avtalu.

Starvið verður at seta skjótast gjørligt.

Meira um starvið fæst at vita við at venda sær til Áka Jespersen, deildarleiðara á tlf. 34 59 00.

Umsóknir - sum allar verða viðgjørdar í trúnaði - verða at senda til:

**Smyril Line**
**Postsmoga 370**
**110 Tórshavn**

SMYRIL LINE